

# Stórur føroyskur áhugi fyri samvinnu við Russland

Jan Müller

27.05.2015 - 13:39

Oljan.fo

Umleið tjúgu føroyskar fyritøkur til móttøku í Moskva í dag

Umboð fyriumleið  20 føroyskar fyritøkur og feløg verða hjástødd, tá føroyska sendistovan hevur móttøku í russiska høvuðsstaðnum Moskva í dag. Harumframt luttekur eisini Kaj Leo Johannessen, løgmaður saman við føroyska sendiharranum, Bjørn Kunoy.

Føroysku fyritøkurnar eru ein blandingur av fyritøkum innan fiskivinnu, frálandsvinnu, flutning, ferðavinnu og veitingarvinnu av ymsum slag.